


*Nr. 2* *20. januar 2013* *73. árg.*

# Sum tín dagur er, skal tín styrki vera

Ein ung kvinna hevði verið seingjaliggjandi í mong ár. Ein dagin kom ein vinkona at vitja hana, og hin sjúka kærdi sína neyð fyri henni.

Hon orkaði ikki at hugsa um framtíðina, ið tóktist alt annað enn ljós. Vinkonan spurdi, um byrðan nú í løtuni var ov tung, um tað var pínan beint nú, sum hon ikki kundi bera.

Hin sjúka segði, at so var ikki. Til henda dag hevði hon fingið kraft úr erva, men tað var teim komandi døgunum, hon stúrdi fyri.

”Men, góða,” segði vinkonan við einum brosi, ”so er jú onki at stúra fyri. Tú skalt liva henda dagin við tí kraft, Gud gevur tær, og kraftin svarar altíð til umstøðurnar. Tú skalt ikki goyma av kraftini í dag til komandi dagar, tí tá ið teir koma, gevur Gud tær nýggja megi at koma ígjøgnum teir.”

Neyvan er henda unga konan nakað undantak. Tey flestu av okkum munnu helst líkjast henni meira og minni. Tað, sum fer at henda einaferð í framtíðini, tað nívir okkum longu í dag. Hjá teimum, sum sjúk eru, er kanska skjótast at falla í fátt, men høvdu vit øll – hvussu umstøðurnar eru – dugað okkum hetta, at leggja alt í Guds hond. Lívið gjørdist á tann hátt nógv lættari, og mangur ein dagur hevði lagað seg øðrvísi og betur fyri okkum.

Lati okkum, nú ið vit eru farin inn í eitt nýtt, ókent ár, royna ráðini, sum henda sjúka konan fekk frá vinkonuni.

*”Kraft og ráð,” so eru orð hans blíð.*
*Hann vil verja hvørt eitt barn sítt kæra,*
*metta sálir við sítt náðiborð.*
*”Sum tín dagur skal tín styrki vera”*
*so hans lyftiríku orð.*

# Alkohol

## Jørn Strand

Eg skal siga tær tað, at alkohol er djevulin í flótandi formi. Eg vaks upp í einum alkoholheimi. Eg ræddist hvørt fríggjakvøld, tí tá geltu róp, skríggj og skrál, og lampurnar smildraðust. Soleiðis fóru míni barnaár í ófriði og harðskapi.

Djevulin kemur ikki dragsandi við einum ølkassa og sigur: ”Nú skulu vit hugna okkum!” Nei, hann er snildari enn so. Hann sigur: ”Nú skulu vit taka eitt vínglas aftur við matinum!” Djevulin kemur upp á tann fína mátan; men mong, sum eru byrjað við víninum, hava vitnað, at tey eru endað í óføri, heilt har úti, sum krákurnar venda.

Tá ið eg tali ímóti brennivíni, siga fólk við meg: ”Tú ert lógartrælur! Eitt vínglas bilar einki.” Men andans frukt er fráhald – ikki mátahald. (Gal. 5,22) Tað sigur orðið.

So eru tað onnur, sum siga: ”Jesus gjørdi vatn til vín.” Ja, takk skalt tú hava. Í Eysturlondum er so skróvturt, so har eru liviumstøðurnar øðrvísi. Her hjá okkum trýtur vatnið ikki, tí her regnar í ”spannavís”.

Orðið ávarar okkum móti víni. ”Hygg ikki at víninum, hvussu reytt tað er, hvussu tað glógvar í steypinum og væl rennur niður! At endanum tað bítur sum ein slanga og spýr eitur sum ein ormur.” Orðt. 23,31-32. – ”Drekkið tykkum ikki druknar í víni, sum førir óflýggjaskap við sær; men verðið fyltir av andanum.” Ef. 5,18. – Orðið sigur, at tey trúgvandi eru kongalig: ”Men tit eru ein útvald slekt, ein kongaligur prestaskapur …” 1. Pæt. 2,9. Og eisini kongar verða ávaraðir móti vínunum: ”Tað sømir ikki kongum, Lemuel, tað sømir ikki kongum at drekka vín ella høvdingum at spyrja eftir sterkum drykki.” Orðt. 31,4.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Hevur tú nakrantíð spurt teg sjálva: "Hvussu skuldi Gud kunnað brúkt eina slíka sum meg?" Sálmaskaldið svarar: "Fyri navn sítt!" Tað er bara eitt navn, sum hevur týdning - og tað er ikki títt! Gud hatar stoltleika líka so inniliga, sum hann elskar eyðmjúkleika. Í Orði hansara stendur: "... men eyðmjúkum veitir hann náði." Ják. 4,6.

*e.c.* ums.

# Slatur

*"… at bera sley og leggja seg upp í tað, sum teimum ikki kemur við, og tala tað, sum er ólíkligt."* *1. Tim. 5,13.*

Um onkur kemur við sleyi til tín, steðga teimum so og sig: "Hví skal eg vita hatta? Hevur tú tosað við tey, sum tú talar um?" Hugsa teg um, sleyut menniskju kanst tú ikki líta á! Bíblian sigur, at tú skapar trupulleikar, um tú lurtar eftir sleyi: "Hinum ónda dámar betur at koma millum vánafólk; lygnarin lurtar alspentur, tá ið samrøðan er ónd." (Orðt. 17,7 Nýggj Umseting) Og Judas leggur afturat: "Teir valda split; hugsanir teirra eru verðsligar; teir hava ikki Guds anda." (v. 19 N.U.).

Hetta eru álvarsligar ákærur. Og internetið hevur bara gjørt tað verri, tí nú kunnu fólk spreiða slatur og órein tíðindi skjótari og longri út, samstundis sum tey eru ónevnd, meðan tey gera tað.

Paulus talar um tey, sum "… altíð spilla út og eru forrend hvør móti øðrum …" (Gal. 5,15 N.U.) Hann sigur, at tey skulu steðgast og leiðbeinast. Nær upplivdi tú tað seinast í kirkjuni? Sálomon segði: "Sleyivætti ber loyndarmál út, hav tí einki felag við skræðugákar." (Orðt. 20,19) Við øðrum orðum: Halt teg burtur frá teimum.

Skjótasti mátin at steðga sleyi er at ábyrgda tey, sum spreiða slatur. Meinigheitin er ikki ein avdúkandi sjónvarpssending, har vit sýna fram menniskju og heinga teirra skitnu klæði út, so øll verðin kann skoða tey. Tvørturímóti: "Tá ið brenni er uppi, sloknar eldurin, tá ið eingin baktalari er, heldur klandrið uppat." (Orðt. 26,20).

Jesus lærir okkum, hvussu vit skulu bera okkum at, tá ið persónligir trupulleikar koma millum kristnar brøður og systrar: 1) "… tala við hann undir fýra eygum …" 2) Um hann ikki lurtar eftir tær "… mást tú taka ein ella tveir aðrar við tær …" 3) Um hann ikki vil lurta, skalt tú bera tað fram fyri kirkjuliðið." Matt. 18,15-17. Hetta er tann leiðin, Jesus vísir okkum á, og hana mugu vit brúka.

"… et Ord til Dagen"
*Effie Campbell* umsetti.

---

Tað eru tvey ting, sum tú ongantíð skalt gera. Tú skalt ongantíð vænta at kenna teg fullkomiliga heima í hesari verð, tí "at borgaraskapur okkara er á himnum …" Fil. 3,20. Men tú skalt heldur ikki vera so hugtikin av Himli, at tú ikki ert til nakað jarðiskt gagn.

*e.c.* ums.

# Óttast ikki

Óttast ikki – lesa vit ofta um í evangeliunum. Soleiðis varð sagt við Mariu, tá ið eingilin Gabriel stóð í fátæksliga kamari hennara. Soleiðis varð sagt við hirðarnar á Betlehems fløtum. Soleiðis varð sagt við kvinnurnar páskamorgun við hina tómu grøvina.

Og soleiðis heilsaði menniskjusonurin sínum lítla og óttafulla lærusveinafylgi: ”Ber ei ótta, tú fylgi lítla, tí at væl hevur tað líkað faðir tykkara at geva tykkum ríkið!”

Og hetta er enn tann boðskapurin, sum skal stimbra hitt óttafulla kirkjuliðið. Okkum hevur kanska ongantíð tørvað hesa heilsanina meira enn nú.

Men tá ið orðið sigur: ”Óttast ikki!” – so vísir tað samstundis á Gud, Faðir okkara. Og í vandastundini gevur Gud okkum heilaga, æviga ríki sítt – og tí skulu vit ikki óttast, men hava gott treysti.

”Óttast ikki, tí at eg eri við tær, lat ikki hugin bila tær, tí at eg eri Gud tín!” sigur Harrin í Jes. 41,10.

Og hetta er veruliga alt, sum okkum tørvar. Tí skulu vit hava gott treysti – eisini nú vit fara inn í eitt nýtt ár .

*t.* týddi.

# Trupulleikar

Harrin segði við Ábram: “Far burtur úr landi tínum, frá ættarfólki tínum.” (1. Mós. 12,1)

Har aktaði Ábram, sum hann kallaðist tá, ikki Gud. Hann tók Lot, bróðursonin við sær, hóast Harrin hevði sagt, at hann skuldi fara burtur frá sínari familju.

Tá ið vit biðja um fyrigeving fyri ávísar syndir, so strikar Harrin hesar syndirnar út. Ábram fekk sjálvandi fulla fyrigeving fyri hesa syndina; men trupulleikarnar av hesum ólýdninum stríddist hann við í nógv ár framyvir. Millum annað noyddist hann at fara í kríggj fyri at bjarga bróðursoninum.

Soleiðis er tað eisini við okkum. Vit koma okkum í nógvar trupulleikar, tá ið vit gera ímóti Guds vilja. Hann er hóast alt tann, ið veit best. Hann kennir endan á hendingini, áðrenn byrjanin er komin. Tí er best at gera eftir hansara vilja og biðja: “Verði vilji tín!”

Seinni gjørdi Gud ein sáttmála við Ábram, sum so skifti navn og kom at eita Ábraham, ið merkir faðir at mongum fólkasløgum. 1. Mós. 17,5.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74